ÚTBJÓÐING

Útbjóðing av lastbilaflutningi í 2005

Flutningur av gróti, skervi og sandi millum bryggjuna á Langasandi og grótbrotið í Hundsarabotni verður við hesum boðin út alment.

Áhugað kunnu venda sær til LV-skrivstovuna, Tinghúsvegi 5, tlf. 311333, har frágreiðing og treytir verður útflýggjað.

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

ÚTBJÓÐING

Útbjóðing av lastbilaflutningi í 2005

Flutningur av forknúsaðum gróti og skervi frá grótbrotinum í Skørðunum og oman á havnalagið í Porkeri verður við hesum boðin út alment.

Áhugað kunnu venda sær til LV-skrivstovuna, Tinghúsvegi 5, tlf. 311333, har frágreiðing og treytir verður útflýggjað.

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

ÚTBJÓÐING

Útbjóðing av lastbilaflutningi í 2005

Flutningur av blandaðum asfalti og skervi úr Hundsarabotni og skevi av Hústoft verður við hesum boðin út alment.

Áhugað kunnu venda sær til LV-skrivstovuna, Tinghúsvegi 5, tlf. 311333, har frágreiðing og treytir verður útflýggjað.

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

Lesið Sosialin -so eru tit við!

# SÍ nærkast greipuni

**Sørvingar eru væl ávegis greipuni í mansflogbólti í ár, og um teir vinna á nærmastu kappingarneytunum úr Fleyr sunnudagin, hava teir tikið eitt risafet móti gullinum**

FLOGBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Flogbóltsbarometrið í Sørvági er í topp í hesum døgum. Áhugin fyri flogbólti hevur ongantíð áður verið so stórur í Sørvági sum í løtuni, nú mansliðið hjá felagnum stendur til at vinna greipuna á sjálvum 100-ára degnum hjá felagnum.

**Nærmastu kappingarneytarnir vitja**

Sunnudagin fær SÍ vitjan av Fleyr, sum er næstfremsta liðið á stigatalvuni. Um sørvingar sunnudagin aftur sýna slíkan flogbólt, sum teir gjørdu í steypafinaluni móti Mjølnir farna vikuskifti, so er eingin ivi um, hvagar sigurin fer. Men ofta kemur tað fyribrigdi, sum verður rópt "steypatimburmenn", og ger vart við seg, og tá kann Fleyr hava ein møguleika.

SÍ má tó metast sum greiður favorittur undan dystinum, og tað verða óivað heilt nógvir spentir sørvingar til dystin í Fimleikahøllini sunnudagin. Um teir fara at hoyrast eins væl, sum teir gjørdu til steypafinaluna fyri viku síðani, tað er so ein annar spurningur.

Hin dysturin í meistaradeildini hjá monnunum sunnudagin verður á Kambsdali, har ÍF fær vitjan av Fram. Her er talan um ein dyst millum tvey tey niðastu liðini í deildini, og ilt er at spáa um úrslitið av hesum dysti.

TASKI ...mest seldu gólvvaskimaskinur

SWINGO 750/1250B



A.H.Jensen TEL 322676

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN

MENN

| | dystir | v - j - t | vu. mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 6 | 5 - 0 - 1 | 473 | 423 | 50 | 18 |
| 2 Kyndil | 6 | 2 - 0 - 4 | 470 | 397 | 73 | 12 |
| 3 KÍF | 6 | 3 - 1 - 2 | 407 | 433 | -26 | 11 |
| 4 StÍF | 6 | 3 - 2 - 1 | 422 | 452 | -30 | 11 |
| 5 H71 | 6 | 2 - 0 - 4 | 459 | 469 | -10 | 9 |
| 6 Neistin | 6 | 1 - 1 - 4 | 441 | 498 | -57 | 6 |

## Flogbóltsstøður

**Meistaradeild, kvinnur**

| | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 15 | 13 - 2 | 41 | 12 | 29 | 17 |
| 2 TB | 15 | 12 - 3 | 38 | 20 | 18 | 15 |
| 3 Dráttur | 15 | 9 - 6 | 36 | 24 | 12 | 14 |
| 4 ÍF | 15 | 6 - 9 | 22 | 29 | -7 | 8 |
| 5 KÍF | 15 | 4 - 11 | 16 | 36 | -20 | 4 |
| 6 SÍ | 15 | 1 - 14 | 11 | 43 | -32 | 2 |

**Meistaradeild, menn**

| | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 12 | 11 - 1 | 34 | 9 | 25 | 22 |
| 2 Mjølnir | 12 | 8 - 4 | 28 | 16 | 12 | 16 |
| 3 Fleyr | 12 | 8 - 4 | 28 | 20 | 8 | 16 |
| 4 ÍF | 12 | 2 - 10 | 11 | 32 | -21 | 4 |
| 5 Fram | 12 | 1 - 11 | 10 | 34 | -24 | 2 |

**Máltindurin:**

| | | |
|---|---|---|
| Halgir D. Olesen | H71 | 107 (13) |
| Damir Oros | Neistin | 102 (18) |
| Ingi Olsen | VÍF | 99 (26) |
| Sveinur Justinussen | StÍF | 97 (8) |
| Agnar Joensen | VÍF | 83 (6) |
| Áki Mørk | Neistin | 83 (7) |
| Leivur Justinussen | StÍF | 83 (16) |
| Regin Petersen | KÍF | 81 (8) |
| Piti Negru | H71 | 79 (5) |
| Høgni Klein | Kyndil | 78 (3) |
| Henrik Gerster | H71 | 69 (6) |
| Josef Abrahamsen | Kyndil | 68 (13) |
| Alexandur Johansen | StÍF | 68 (21) |
| Jakob Jónsson | Kyndil | 63 (2) |
| Blagoje Buha | Neistin | 62 (10) |

# Mjølnir kann næstan tryggja sær gullið

**Sunnudagin verður ein endurtøka av steypafinaluni hjá kvinnum, tá ið TB og Mjølnir bresta saman í Trongisvági. Vinnur Mjølnir dystin hava tær nærum tryggjað sær gullið í ár**

FLOGBÓLTUR
*Terji Nielsen*

Uttan iva verða leikararnir á heimaliðnum, TB, ógvuliga uppsettar at vaska steypaósigurin av sær, men tær eru eisini fullgreiðar yvir, at skulu tær koppa Mjølnir, so er neyðugt, at tær spæla upp til sítt allarbesta.

**Stórur munur í finaluni**

Í steypafinaluni var rættuliga stórur munur á liðunum báðum, men ofta verður sagt, at eitt lið, sum gerst steypavinnari, spælir illa í fyrsta dystinum eftir finaluna. Tað kunnu tær hjá TB so vóna, og tað sama gera óivað eisini leikararnir hjá Drátti.

Dráttur, sum ikki skal í dyst í vikuskiftinum, hevur enn møguleikan at gerast føroyameistari, men um so skal verða, er tað næstan neyðugt, at TB vinnur á Mjølnir sunnudagin. Dráttur er eitt stig aftan fyri TB og trý aftan fyri Mjølnir. Bæði TB og Mjølnir hava eftir at spæla móti Drátti á Giljanesi.

Tað verða óivað nógvir áskoðarar til dystin í Trongisvági sunnudagin, og nógv tvøráfólk eru óivað sera spent til dystin.

Hin dysturin í meistaradeildini hjá kvinnum hetta vikuskifti verður á Kambsdali, har ÍF fær vitjan av KÍF. Hetta er ein dystur millum tvey av lægru liðunum í deildini, men ÍF má metast sum favorittur.